

# NÁTTARLÍVIÐ Í NEWCASTLE ER VÍÐAGITIÐ



## Útlendsku ferðaritini skriva nógv gott um náttarlívið í Newcastle, og er tað ikki uttan grund, tí útboðið er stórt

Newcastle er rættiliga víðagitin fyri sítt náttarlív. Framvið høvuðsgøtunum í norðurenska býnum eru bæði matstovur, vertshús og onnur veitingarstøð. Mong útlendsk ferðarit hava greitt lesarum sínum frá, at Newcastle er avgjørt millum fremstu býirnar, tá talan er um náttarlív. Ein stórur partur av vertshúsunum og náttarklubbunum eru í økinum kring Bigg Market og Quayside økið, sum liggja miðskeiðis í Newcastle. Onnur væl umtókt støð eru at finna við høvuðs-jarnbreytarstøðina, Collingwood Street, Neville Street, Pink Square og Osbourne Street. Fyri stuttum læt upp eitt nýmótans biografhøli í Newcastle, sum eitur "The Gate". Umframt 12 vælútgjørdar biografhallir, sum allar hava hátøknilig filmvísingartól, so eru eisini barrir og onnur veitingarstøð í "The Gate".

Á Stowell Street er ein kinesisk bygd, har ein kann finna nógvar kinesiskar matstovur og onnur vitjanarverd støð. Nógvir av teimum fremstu kokkunum í Onglandi eru vorðnir víðagitnir fyri síni avrik á matstovunum í tí kinesisku bygdini í Newcastle. Newcastle er eisini væl fyri, tá tað kemur til indiskar, persiskar, japanskar og italskar matstovur, sum gevur ferðafólkunum óteljandi valmøguleikar. Seinnu árini eru loyvi givin til fleiri vertshús, barrir og klubbar at hava longri avgreiðslutíðir. Hetta merkir, at fleiri av hesum veitingarstøðunum hava opið frá klokkan 11 á morgni til klokkan tvey ella trý um náttina, og veita tí eina framúr góða tænastu tað mesta av degnum.